gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Strandamáling hevur bygt út

**Útbyggingin á Strandamáling er liðug. Virkið, sum fyrr var 470 fermetrar til víddar, er í dag knappar 1.100 fermetrar. Eisini hevur virkið fingið søluumboð í Havn, sum víðkar tænastuna munandi**



*Jógvan Óli á Fríðriksmørk, stjóri á Strandamáling, metir tað vera av sera stórum týdningi at hava fingið fast søluumboð í høvuðsstaðnum*
Mynd: Edvard Joensen

ÍDNAÐUR
*Edvard Joensen*

**á Strondum:** Strandamáling hevur bygt út og meira enn tvífaldað gólvvíddina. Samstundis hevur virkið fingið fast søluumboð í Havn, og harvið økt útboðið munandi.

Jógvan Óli á Fríðriksmørk, stjóri á Strandamáling, sigur, at útbyggingin, teir hava gjørt, ger tað munandi arbeiðsligari á virkinum.

Bygt er upp í virkið suðureftir. Ein goymsluhøll upp á 600 fermetrar, har umsitingin er í sunnara enda, er bygd afturat teimum 470 fermetrunum, virkið var til víddar, tá byrjað varð.

Gamla virkið verður seinni umbygt, soleiðis, at umstøðurnar til sjálva framleiðsluna vera nógv betri, enn tær eru nú. Onkur maskina er keypt, men tað er ikki tað stóra, sigur stjórin. Talan er um onkra blandimaskinu og tílíkt.

Men umstøðurnar á goymsluni verða so øgiliga nógv betri enn fyrr. Og skuldi tað hent, at plásstrot verður har einaferð, ber væl til at seta fleiri hillar upp inni á goymsluni. Eitt sindur trengri gerst tað rímiligt tá, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, men tað klára teir við at fáa serligar truckar, sum gjørdir eru til at arbeiða í trongum goymsluhallum.

Útbyggingin hevur ikki verið dýr, sigur hann. Umleið hálvaaðru millión hevur bygningurin kostað, meðan maskinurnar, sum komnar eru aftrat, kosta væl minni enn eina hálva millión.

Og hann leggur aftrat, at alt er fíggjað úr egnum lumma. Tað er einki lán tikið til hesa útbyggingina.

Tað arbeiða fýra manns fast á málingavirkinum á Strondum um summarið, tá mest er at gera. Um veturin plaga teir at vera tríggir.

## Nýtt søluumboð

Strandamáling hevur ikki bara víðkað framleiðsluhølini, uttan eisini fingið nýggjar seljarar til málingina.

Avtala er gjørd við Balslev í Hoyvík um at vera søluumboð í høvuðsstaðnum.

Tað ger, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, at til ber at hava nógv størri úrval av máling at lata fólki.

Fyrr hava ymsu málingahandlarnir, og kanska onkur vanligur handil eisini, selt Strandamáling. Men úrvalið hevur ikki verið tað, sum ynskiligt er, tí bara hevur borið til at selt standardframleiðslurnar.

Nú handilin hjá Blaslev er farin at selja Strandamáling, hava teir samstundis fingið eina blandimaskinu, so fólk nú kunnu biða um at fáa júst tann litin ella ta tóningina, tey vilja hava.

– Og tann møguleikin ger tað nógv meria áhugavert hjá fólki at keypa máling, sum vit eisini merkja, sigur stjórin á Strandamáling, sum leggur aftrat, at hóast Balslev er fast søluumboð uttan fyri Strendur, merkir tað sjálvandi ikki, at ikki eisini aðrir handlar selja Strandamáling.

Hann sigur, at málingavirkið leggur seg eftir at selja góðsku, og so má keyparin eisini rokna við, at tað kostar eitt sindur. Soleiðis er tað við øllum. Hann leggur dent á, at málingin av Stondum avgjørt er fult á hædd við aðra máling, sum er á marknaðinum. Hinvegin ber eisini til at fáa býligari máling av Strondum.

– At hava handilin hjá Balslev sum umboð, tryggjar samstundis eitt sterkt og støðugt umboð, sum klárar at hava nakað liggjandi á goymslu, um tað skal vera, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk.

Tað er serliga til privatfólk, Strandamáling selur. Teir hava lagt seg eftir at framleiða til vanliga brúkaran, og tað tykist hava eydnast, sigur stjórin. Hann hevur ikki nøkur nágreinilig tøl at vísa á, uttan tað, teir sjálvir selja. Tað liggur um 70.000-80.000 litrar av vanligari máling um árið.

Samlaða nýtslan av máling í Føroyum er samb. hagtølum einar 600.000 litrar. Men tá er alt íroknað, sum ber brá av máling. Vegmáling, billakk og hvat ein nú kann koma í tankar um, sigur stjórin á Strandamáling.

## Framtíðin

– Tað er greitt, at roynt verður alla tíðina at finna nýggjar vørur, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk.

Hann sigur, at tað helst er so, at teir hava gjørt í minna lagi við eitt nú skipsmáling. Men grundin er tann, at teir miðvíst hava valt at fara eftir vanliga brúkaranum, sum málar hús og garð. Og tað halda teir eg hava klárað rímiliga væl.

Tá hesir menninir byrjaðu við málingavirkinum í 1996 høvdu teir 13 prosent av føroyska maknaðinum. Tann parturin er í dag nógv størri, sigur stjórin, uttan tó at nevna nakað ítøkiligt tal.

Hann sigur, at teir hava ikki lagt seg eftir útflutningi sum so, tí tað er nokk at gera til heimamarknaðin. Og skal hugsast um at koma á altjóða marknaðin, har kappingin er sera hørð, fer tað at kosta nógvar pengar.

Hinvegin var kanska ikki heilt ómøguligt at komið upp í part, um teir funnu einahvørja hjáframleiðslu, sum teir fingu sett seg á. Og slíkir møguleikar verða sjálvandi eisini alla tíðina havdir í huganum.

Eisini heilsu og umhvørvi skal hugsast um. Og arbeitt verður alla tíðina við at fáa tey skaðiligu evnini, sum verið hava í máling, burtur. Eitt nú eru upploysingarevnini, sum hava verið í máling, við at hvørva.

– Tað er bara ein spurningur um tíð, nær vit lata fyrstu 0 prosent málingina á marknaðin. Tað er máling við ongum upploysingarevnum í, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, stjóri á Strandamáling.



*Útbyggingin av Strandamáling hevur meira enn tvífaldað gólvvíddina á virkinum*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæra kona, mamma, omma og systir okkara,

**Martha Hovgaard**

doyði og varð jarðað.

**Conrad, Gudrid, Nenna, Jákup, Jóna, Ári og Maja**

gult5 cyan5 magenta5 svart5





*Dorrit Moussaieff og Ólafur Ragnar Grímsson, forseti Íslands, koma til Føroya í morgin og vitja her til leygardagin*
Mynd: Morgunblaðið

# Íslendski forsetin vitjar

**Forseti Íslands, Ólafur Ragnar Grímsson, kemur á almenna vitjan í Føroyum í morgin. Vitjanin endar leygardagin**

FORSETAVITJAN
*Edvard Joensen*

Íslendski forsetin Ólafur Ragnar Grímsson, kemur til Føroya á almenna vitjan frá hósdegnum til leygardagin. Í fylgi við honum er eisini frú Dorrit Moussaieff, sum er ensk.

Ólavur Ragnar Grímsson varð í 1974 giftur Guðrún Katrín Þorbergsdóttir, og tey eiga saman tvíburðar, Dalla og Tinna, sum eru føddar í 1975. Tann 12. oktober 1998 doyði Guðrún Katrín av krabbameini.

Seinni hitti forsetin ta ensku Dorrit Moussaieff, sum á ferðini til Føroya umboðar Ísland sum forsetafrúa.

Ólafur Ragnar Grímsson er føddur í Ísafirði tann 14. mai 1943. Har vaks hann upp og gekk í skúla, til hann fór á studentskúla í Reykjavík, haðani hann tók prógv í 1962.

Síðan gekk leiðin til Englands, har hann las við universitetið í Manchester. Í 1965 tók hann BA íbúskapi og samfelagsfrøði. Í 1970 tók hann PhD í samfelagsfrøði og byrjaði at undirvísa við Háskóla Íslands.

Hann gjørdist seinni professari við Háskólan og varð har til hann í 1988 gjørdist fíggjarmálaráðharri í stjórnini hjá Steingrími Hermansyni.

Eitt sindur ymiska kós hevur Ólafur Ragnar havt í sínum politiska lívi. Hann var í árunum 1966 til 1973 nevndarlimur í ungmannafelag Framsóknarfloksins, eins og hann eisini var nevndarlimur floksins frá 1971 til 1973.

Hann gjørdist altingsmaður fyri Mið- Vinstrasamgonguna í 1974 og varð samstundis formaður fyri samgonguni.

Í 1978 varð hann valdur í Altingið fyri Altýðu Bandalagið (Kommunistaflokkin). Hann var formaður fyri tingbólkin frá 1980 til 1983 og formaður floksins fram til 1995. Umframt hevur hann havt fleiri álitisstørv, bæði í Íslandi og útheiminum.

Í 1996 varð Ólafur Ragnar Grímsson valdur til fimta forseta Íslands og varð afturvaldur í fjør.





